# Otto Sørensen 85 ár


*Otto og Nelly Sørensen*

Ólavssøkuaftan 28. juli fyllir Otto Sørensen í Havn 85 ár.

Otto er porkeningur. Foreldrini vóru Sunneva hjá Lávusi og Petur undir Stígnum. Fimm vóru sysktini, og Otto var í miðuni. Tvey tey elstu sysktini Elsupa Súsanna og Jóhannes eru farin, meðan Otto, Eiler og Evald eru millum okkara enn.

Sum ungur fór Otto til Havnar í 1944 í Skipshandilin, har hann var inntil hann í 1959 fór á skrivstovuna hjá Landsverkfrøðinginum sum bókhaldari. Hetta kom at vera hansara lívsstarv, har hann var væl lýddur av øllum. Hann gavst vegna aldur í 1993. Í fleiri ár hevði Otto eisini bókhald fyri okkurt skip og virki.

Í 1950 giftist Otto við Nelly, sum er úr Nólsoy. Tey settu búgv í Leivsgøtu 13, har tey búgva enn. Tey fingu trý børn: Nils í 1952, Sunnvu í 1956 og Katrin í 1963. Tey eiga seks abba- og ommubørn.

Otto og Nelly hava havt sítt andaliga heim í samkomuni í Ebenezer, har Otto í mong ár hevði um hendi avgreiðsluna av Sunnudagsskúlablaðnum, sum Ebenezer gav út. Otto var ein av teimum, sum rættlas fyrstu føroysku bíbliuna í týðing Victor Danielsens, sum kom út í 1949, og tá ið endurskoðaða útgávan av bíbliuni kom út í 1976, var Otto eisini ein sum rættlas. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði, sum krevur stóra precisión, og har er Otto rætti maðurin.

Tey, ið ynskja at heilsa uppá Otto føðingardagin, eru hjartaliga vælkomin í Tórugøtu 27 (hjá Sunnvu) 28. juli millum kl. 10 og 14.

Góði Otto, hjartaliga tillukku við stóra føðingardegnum og tær og Nelly verða ynskt mong góð ár enn. Má Harrin signa og varðveita tykkum í elliárum tykkara.

J

# Sølvi Mortensen 80 ár



Í dag, 23 juli fyllir Sølvi Mortensen av Sandi 80 ár.

Ja, hvar skal man byrja, jú eg byrji við óvitadøgunum, tá vit plagdu at spæla, tá Sølvi, sum ein av teimum størru dreingjunum legði fyri. Stuttligur og minst líka beistaktigur, sum vit aðrir.

14 ára gamal fór eg til skips og sanniliga, so var Sølvi eisini við Mjóvanes, tá var hann vorðin 17 ára gamal, og var sítt triðja ár til skips sum ein ágrýtin unglingi.

Nú gingu nøkur ár og komu vit at búgva saman í Havn, undir útbúgving. Hann gekk uppá longdina og Gustav og eg til setuskipara. Vit vóru fýra sum búðu á einum kamari, Sølvi, Gustav og eg sjálvur av Sandi og Ove Olsen úr Hósvík. Sølvi minnist sjálvur stuttleikan ið har var; men tað minnist eg at annaðhvørt vóru vit í kirkju ella í meinigheitshúsinum, og ofta í báðum støðum sunnudagar.

Vit komu aftur at sigla saman til ísfisk við Oyrasker og varð hetta eisini ein góð tíð.

Nú gingu nøkur ár og vóru vit vorðnir familjumenn, vit tosaðu um at fáa okkurt at henda í bygdini og fóru Sølvi, Gullbrand og eg undir at skaffa pengar til at keypa eitt skip. Hetta bleiv veruleiki og høvdu vit Dagstjørnuna í fleiri ár saman við øðrum sandingum. Sølvi fór tá uppá land, at reka Eldhúshandilin saman við sváginum, og er tað ikki sørt at hann sæst har enn.

Sølvi hevur veri ein góður maður fyri Sandsbygd við sínum trúðarlívið. Trúgvur hevur hann veri ímóti Missiónshúsinum sum hann fyrireikaði at fáa. Øll tey ár, ið hann hevur hildi sunnudagsskúla, tey eru nógv verd fyri okkara bygd og fyri okkara kristnu trúgv.

Børn míni og abbabørn og fleiri við teimum, hava nógv gott at siga um Sølva, og minnir eru øll góð.

Hvussu nógv ár ið tær eru ætlað afturat, er bert ein ið veit, men vit fara at ynskja tær, saman við tínum kæru, nøkur góð ár afturat og higani frá okkum verður ynkst tær so hjartaliga til lukku.

**Sólvit Simonsen**

NB Eg var noyddur at bróta meg sjálvan av, tí eg kundi blivi sitandi og skriva.



Pauli Nielsen

# Goym moralin til seinni

## Grugg til gamans og til álvara upp undir ólavsøkuna og ólavsøkudagarnar.

Barbara Christoffersen, Páll Danielsen og fýra ferðir Tórgarð. Brecht og sera royndur týskur leikstjóri. Tað fær illa verið betri, hugsaði eg, tá ið eg nú eitt kvøldið leitaði mær oman í hølini hjá tjóðpallinum at síggja Grugg tulka Brecht við sangleikinum "Goym moralin til seinni".

Meðan eg bíðaði eftir, at leikurin byrjaði, mól ein stubbi av einum teksti hjá Brecht í høvdinum á mær, sum eg minnist frá mínum ungu døgum. Eg endurgevi hann eftir minninum:

Hin ungi Aleksandur legði
India undir seg.
Var hann púra
einsamallur?
Cesar vann á gallarunum.
Hevði hann í minsta lagi
ikki ein kokk við sær.
Filip kongur græt, tá í floti
hansara gekk undir.
Græt eingin annar?

Stubbin gevur eina hóming av, hvørjum Brecht var upptikin av. Hvør var áskoðanin á samfelagið, sum vit fyltu børnini og ungdómin við, og sum flest øll okkara góðtóku uttan fyrivarni. Nakrir tekstir hjá Brecht vóru um hetta mundið - seinast í 60-árunum og fyrst í 70-árunum – týddir til føroyskt, og summir prentaðir í tíðarritinum Framanum.

Sangir hjá honum úr ymiskum uppsetingum, sum vóru nógv frammi tá, mólu eisini í høvdinum.

Gleddi meg at hoyra onkrar teirra í føroyskari týðing. Kendi eitt nú Surabaya Johnny og Sjórænara Jenny aftur á listanum yvir sangir í leikinum.

Lat meg siga beinanvegin, at eg varð ikki svikin. Sat sum rúnarbundin frá fyrstu løtu og til leikurin, áðrenn eg visti av, var liðugur.

Tað var sum at vera á kabarett. Serstaka sanglagið, tónleikurin og ferðin vóru imponerandi.

Sangirnir og tekstirnir leggja iðjandi lívið fram fyri okkum, eisini hjá teimum, sum vit kunnu halda, ikki liva eitt sømiligt lív, og tí ikki hava so nógv at liva fyri. Men lívið er altíð sterkari enn deyðin. Næstan sum eitt motto varð setningurin "Upp við høvdinum! Tann sum ikki er deyður enn, hann er livandi!" singlaður í høvdið á okkum. Og beint aftaná: "Tann størsti ítrótturin byrjar har, sum hann langt síðani er hildin uppat at vera sunnur."

Brecht vildi gera sítt til at fáa okkum at hugsa og vaksa sum menniskju.

Haldi ikki, at nakar fer órørdur úr leikhúsinum eftir at hava sæð og hoyrt leikin. Setningar og sangløg hanga í oyrunum, og mátturin frá væl uppløgdum leikarum situr í kroppinum.

Einaferð varð sagt um ein av heimsins máttmiklastu monnum, at hann ikki megnaði at spæla fótbólt og tyggja tyggigummi samstundis. Eg veit, at menninir í leikinum eru serstakir, men eg ivist ikki í, at bæði teir og vit kunnu takka leikstjóranum fyri, at teir nú megna at spæla fótbólt og syngja samstundis og uttan himpr, sum um tað bara var eitt spæl.

Takk fyri eitt megnar avrik, Barbara, Páll og fýra ferðir Tórgarð.

Eg vil nýta høvið at mæla øllum til at unna sær hesa løtuna saman við Brecht og Grugg-manningini.